Viðmerkingar til ætlaðu broytingar í alilógini

# Ynskja politikkararnir nýskapan í alivinnuni?

JANET FRÍÐA JOHANNESEN
Fyrrv. nevndarforkvinna í P/f Fiskaaling (í 8 ár)

**Ynskja politikkararnir nýskapan í alivinnuni, og vilja teir hava alivinnu við einum útflutningsvirði omanfyri 50 milliardir um eini 15 ár, má uppskotið til nýggja alilóg broytast. Broytingar eiga ikki nú at verða gjørdir í eigarastrukturinum í alivinnuni, ið kunnu føra til at bert tvær alifyritøkur sita á øllum aliloyvunum**

**Hvussu skal alivinnan síggja út um 15 ár, hvat er visjónin og hvørji langtíðarmál verða sett fyri eina føroyska alivinnu?**
Hesir spurningar mugu diskuterast og langtíðarmál mugu setast, áðrenn broytingar innan eigaraviðurskifti verða gjørdir. Ein nýskapanaðarpolitikkur innan loyvistreytir verður ein av avgerandi faktorunum í samband við nýskapan í alivinnuni.

**Fyrrv. nevndarforkvinna í P/f Fiskaaling (í 8 ár)**
Virði á einari føroyskari alivinnu eigur innan fá ár at verða fleiri ferðir størri enn samlaða virðið í fiskivinnuni. Nær útflutningsvirðið fyri alivinnuna kann fara uppum 50 milliardir, er torført at siga, men talan er um ógvuliga stór virðir í einari komandi alivinnu.

**Hvørjir møguleikar eru í alivinnuni?**
Í dag fevnir føroyska alivinnan í høvuðsheitum um eina laksaframleiðslu, sum brúkar um 20 km2 av føroyska sjóøkinum til aling.
Undir Føroyum liva yvir 200 fiskasløg, ymisk skeljasløg, td. hummari og krabbi, ymiskar algur og tari av ymiskum sløgum. Hetta merkir, at umhvørvið á føroyska sjóøkinum kann rúma eina sera fjølbroytta alivinnu. Hartil er føroyska sjóøkið størri enn 200.000 km2, tvs góðar 10.000 ferðir størri enn aliøki, sum verða nýtt í dag.
Tað fara at vera yvir túsund møguleikar at velja ímillum. Føroyska alivinnan troytir bert ein lítlan part av teimum møguleikum, ið eru innan aling.
Men hvat skal til fyri at vaksa munandi um virðið á einari føroyskari alivinnu.

**Fólk við vitan er fortreytin fyri nýskapn og menning í alivinnuni**
Fólk við vitan og fólk við áræði er fortreytin fyri einari menning av alivinnuni. Skulu vit fáa fólk við vitan til Føroya, mugu tey trívast her og hava møguleika fyri at granska og gera royndir innan øki, sum eru viðkomandi í Føroyum.
Verða bert tveir aktørar í Føroyum og eingin aktivur loyvispolitikkur, koma hesir báðir eigararnir (føroyingar ella útlendingar) at avgera hvat er viðkomandi fyri Føroyar. Hesir eigarar hava ongan møguleika at kenna til allar møguleikarnir, sum eru innan alivinnuna, og eitt einstakt felag fer neyvan at arbeiða við nógvum ymiskum vatnlivandi djórum og plantum.
Motivatiónin hjá vitunaðarfólki at koma til Føroya at granska og gera royndir verður sera avmarkað. Uttan vitunaðarfólk verður nærum eingin nýskapan í alivinnuni.

**Kapitalur**
Kapitalur verður ikki fløskuhálsurin í einari vaksandi alivinnu. Er fólkið við røttu førleikum, áræði og ikki minst burðardyggum verkætlanum tilstaðar, verður ikki truplult at fáa fatur á kapitali. Hesin kann gott vera útlendskur.
Havast skal í huga, at ein stór broyting er við at fara fram innan heilivágsog matvøruvinnuna, sum viðførir at øktur kapitalur kemur inn í matvøruvinnuna.

**Hvat er trupulleikin við at broyta eigaraviðurskiftini í alivinnuni nú?**
Fram til nú er tøknin at ala onnur fiskasløg enn laks ikki serliga kend í norðurhøvum, men arbeitt verður við at menna nýggja tøkni. Stórt trýst er at finna nýggj øki til at ala á, og tá um 70% av jørðini er vatn og sjógvur, er stórt fokus á at finna fram til tøkni innan aling á landi og sjógvi.
At laksaframleiðslan verður savnað hjá færri aktørum enn í dag, er sum so eingin forðing fyri menning av einari komandi alivinnu. Tað eru gott 35 ár síðani, at Fiskaaling byrjaði at arbeiða við aling av sílum og síðani laksi, og laksaframleiðslan er nú vorðin ein so-kallað "standardframleiðsla".
Trupulleikin við at broyta eigaraviðurskiftini fyri aliloyvini nú, har hædd ikki er tikin fyri einum nýskapandi loyvispolitikki, viðførir at alivinnan ikki hevur neyðugu karmarnar til at troyta allar møguleikarnar, sum fara at vera innan aling í Føroyum. Her verður serliga hugsað um nýggjar aktørar innan alivinnuna, sum ynskja at framleiða annað enn laks.
Havast skal í huga, at tað eru tey bestu loyvini, sum alararnir sita á í dag. At ala á hesum loyvum er bíligari enn at ala longri úti. Tí er neyðugt at nøkur av hesum "góðu" økjum, kunnu nýtast til at gera royndir við øðrum vatnlivandi djórum og plantum enn laksi. Skal ein nýggjur alari í gongd við at gera royndir úti á streymasjóvi, verður hetta sera dýrt og tí avmarkað, hvussu nógvar royndir fara at verða gjørdar. Nógv bíligari er at flyta eina væleydnaða framleiðslu frá einum fjørði og út á streymasjógv.

**Uppskot til løgtingslóg um aling av fiski v.m. ikki rokkið**
Uppskotið til alilóg, sum liggur í Løgtinginum, hevur til endamáls at skapa karmar fyri burðardyggari menning av alivinnuni og at skapa karmar fyri, at alivinnan er kappingarfør og kastar sum mest av sær.
Uppskotið livir, eftir mínari sannføring, ikki upp til endamálsorðingina, og skapar ikki karmar fyri einari alivinnu, sum kastar mest av sær.
Tað er eingin ivi um, at komandi fimm árini fer føroyska alingin nærum bert at fevna um laks.
Høvdu vit longu nú gjørt royndir við øðrum alisløgum, tara v.m., kunnu hesi gerast vinnulig um nøkur ár. Tað eru hesi nýggju fiskasløgini v. m., sum kunnu hækka virðið á alivinnuni munandi.
Tí er tað ikki skilagott at broyta eigarastruktur, soleiðis at møguleiki er fyri, at tað bara verða tveir alarar í føroyskari alivinnu, áðrenn greið mál eru sett fyri hvussu ein alivinna skal síggja út um 15 ár, og ein ætlan er gjørd fyri, hvussu málini verða rokkin.

# Obamas knæfald for islam

JØRN NIELSEN
USA

Obama leverede følgende salut til det tyrkiske parlament d. 6/4.09: "Vi vil gerne give udtryk for vor dybe påskønnelse af den islamiske tro for hvad den gennem århundreder har gjort for at danne vor verden, inkl. mit eget land."
Amerikanerne reagerer forskelligt på denne stærke udtalelse. Nogle tager det meget afslappet og siger som mange af os: "Enhver bliver salig i sin tro."Andre mener, han som amerikansk præsident er gået for vidt, men vælger at opfatte hans ord som en harmløs politisk finte. På andre igen, inkl. mig selv, gør denne flirten med islam ondt. Det Amerika, vi elsker, er fædrenes USA. En af dem var Patrick Henry, som er kendt for ordene: "Giv mig frihed eller giv mig død!" Men han sagde også: "Denne nation er ikke grundlagt på religion eller religiøse mennesker, men på evangeliet om Jesus Kristus."
Men nu rækker Obama i stedet Muhammed lillefingeren. Men, hr. præsident, på hvad måde har islam dannet USA og den frie verden? Den amerikanske grundlov har sikret dets borgere frihed og ligeret og ikke favoriseret nogen bestemt religion. Dengang ønskede man Bibelen i højsædet i skolerne, men tog afstand fra, at kristendommen skulle forvaltes af én bestemt kirke a la en europæisk folkekirke. Anderledes er det, som vi alle, véd med islam. Får den magt som den har agt, vil islam blive statsreligion sådan, som den er i det i lande med Sharia som grundlov.
Det var ikke muhamedanerne, der afskaffede slaveriet i USA. De har tværtimod ned gennem historien og i vor tid holdt mange i slaveriets lænker, både fysisk og åndeligt.
Jeg tror ikke, vi kan finde spor af noget som helst positivt i USA, som skyldes islam. Men Obama kan alligevel hylde islam og slippe godt fra det. De fleste amerikanere trækker højst resigneret på skuldrene. Ligesom i Europa. Hermed ønsker jeg ingen hetz mod muslimerne. De lever jo side om side med de kristne. Men deres lære og deres koran er diametralt mod alt, hvad der hedder kristendom, som de hader af et sandt Allah´s hjerte.

# Hví flyta Sornhúsið út í Virksishúsið?

ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN
býráðslimur



Í samband við sparingar og rationaliseringar, var mangt uppi at venda, hvussu tað kundi gerast á besta hátt.
Eitt tað fyrsta, sum var uppi at venda, vóru stovnarnir/tilboðini hjá Klaksvíkar Kommunu, sum ikki eru lógarkrøv. Spurningurin var so, um tað ikki var best, at stongja/lukka okkurt av hesum tilboðunum soleiðis, at tey tilboðini, sum so vóru eftir í kommununi, ikki skuldi skerjast í alt ov stóran mun.
Spurningurin var, um tað ikki var best at stongja frítíðarskúlan, sum kostar 1,7 milliónir brutto árliga, svarandi til 1,4 milliónir netto(tá foreldraparturin er goldin). Her kundi man so við at stongja ein stovn, spara so mikið nógv av pengi, at hetta vildi viðført, at aðrar tænastur ikki í líka stóran mun skuldu skerjast.
Eftir drúgvar samráðingar, bleiv samgongan tó samd um, at frítíðarskúlin framhaldandi skuldi verða opin. Men, at frítíðarskúlin, sum eina fyribilsloysn skuldi flytast út í Virkishúsið fyri á tann hátt spara pening. Tað var eisini frammi at stongja fríðtíðarskúlan, men vit komu so til hesa loysnina.
Og tá eg sigi ein fyribilsloysn, meinast tað við, at frítíðarskúlin skjótast gjørligt skal flyta inn í gamla Tekniska Skúla. Flytingin skal í seinasta lagi verða tá Ósáskúlin verður liðugur. Ein samtykt frá seinasta býráði sigur jú, at frítíðarskúlin skal flyta inn í hendan skúlan.
Í løtuni húsast næmingar og lærarar frá Ósáskúlanum í Tekniska Skúla ímeðan Ósáskúlin verður bygdur. Haldi tað er vert at nevna, at samgongan valdi, at bygg-ingin av Ósáskúlanum ikki skal útsetast.
Grundað frammanfyri metti eg, at best var at semjast um, at frítíðarskúlin fyribils kundi flyta út í Virkishúsið, sum jú er fult av møguleikum. Og eitt gott og stórt spælipláss liggur umleið 50 metur frá Virkishúsinum. Her skulu einans heilt smáar ábøtur gerast fyri at fáa eitt 1.floks spælipláss/sparkivøll til í summar. Eisini er eitt snotisligt pláss (núverandi p-pláss) omanfyri/vestanfyri Virkishúsið sum, um neyðugt, lættliga kann gerast til spælipláss ímeðan frítíðarskúlin heldur til har. Her kundi ein rampa, sum børnini eru glað fyri, verið sett. Havi tosað við handverkara hjá kommununi og hesin rampin kann lættliga gerast fyri ein sera bíligan penga.
Hvussu dagligi dagurin verður, vita vit ikki heilt nágreiniliga enn, tí hetta er so nýtt. Men eg ivist onga løtu í, at við tí fólki, sum starvast innan økið, verður besta loysnin funnin. Møguliga kann tað eisini verða ein fyrimunur fyri Virkishúsið, at børnini longu frá 1. flokki læra húsið at kenna.

**Trygdin**
Áðrenn virkishúsið verður tikið í brúk til frítíðarskúlan, skulu dagstovnakrøvini sjálvandi verða í lagi.

**Hvar eru sparingarnar**
Sparingar við at flyta frítíðarskúlan eru góðar 300.000,- kr árliga. Frá august og restina av 2009 er sparingin kr. 150.000,-. Her kann verða skoytt uppí, at Virkishúsið helst kemur at brúka nakað meir av olju, el. og telefon, tá sornhúsið flytir út har. Men tað sigur seg sjálvt, at tað undir øllum umstøðum verður ein sparing, tí tað er bíligari at reka eitt hús enn tvey, bæði í rakstri og viðlíkahaldi.
Leigaðu hølini skulu vera í sama standi sum tá ið frítíðarskúlin flutti inn!
Rætt er tað. Men líka mikið um frítíðarskúlin flytur út nú ella seinni, er tað neyðugt, at hølini skulu gerast aftur í sama stand, sum tá ið frítíðarskúlin flutti inn.

**Niðurstøða**
Sjálvandi er hettar ikki nøkur ynskilig støða hjá nøkrum, og serliga ikki hjá teimum, sum tað rakar.
Mín sannføring er, at tá ið nú figgjarliga støðan er so álvarslig sum hon er, og drastisk stig skulu takast, er best at gera tað á ein so skynsaman hátt sum tað yvirhøvur ber til.
Eg føli, at tað er ein góð loysn, sum samgongan tók, at frítíðarskúlin skal halda fram. Tað er sera positivt fyri kommununa, at hon ikki misti hesa tænastu. Og ikki minst, at arbeiðspláss eisini verða varðveitt. Tí ein skal ongantíð gloyma, at tað er ein lagna aftanfyri hvørja uppsøgn.
So saman um tikið eri eg glað fyri at politiski viljin bleiv: At frítíðarskúlin skal halda fram. Sjálvt um tað er neyðugt við eini fyribilsloysn, við at frítíðarskúlin flytur út í Virkishúsið til klárt er at flyta inn í gamla Tekniska Skúla.
Ongin ivi skal vera um, at frítíðarskúlin flytur inn í gamla Tekniska Skúla skjótast tilber.